# Stanley, Nanoq Jam og Bubbi á Norður Bryggjuni

**Norður Bryggjan bjóðar í heyst til eina røð av konsertum á Bryggjuni, har 9 av bestu tónleikanøvnunum í Norðuratlantshavi fara á pallin**

KONSERT

*Niels Uni Dam*

*nielsuni@sosialurin.fo*

Komandi vikuskifti verður næsta umfar av "Populærmusik fra Nordatlanten" á Norður Bryggjuni í Keypmannahavn, hesuferð fara Stanley Samuelsen, Nanoq Jam og Bubbi Morthens á pallin trý kvøld á rað.

Stanley leggur fyri fríggjakvøldið við sínum vísum. Landaplágan "Um eg kundi kvøði" verður ivaleyst hæddarpunktið á kvøldinum, men Stanley hevur eisini onnur løg, bæði egin og løg, ið næstan er vorðin hansara egnu. Fuglfirðingurin hevur eitt sera egið útrykk, og tað tykist altíð, sum um hann hevur eina søgu at siga frá.



## Harmonika og gittar

Leygarkvøldið fara Nanoq Jam á pallin. Hetta er, sambært heimasíðuni hjá Norður Bryggjuni, ein sera lívligur bólkur, ið hevur vunnið sær kultstøðu millum grønlendarar. Bólkurin spælir sítt egna bland av grønlendskum vajgat sangum, kensluborðnum gittarløgum og villum harmonika polkaum. Tónleikurin noyðir teg at dansa. Heimasíðan lovar eina veruliga uppliving.

## Blúslist

Bubbi er kendur í øllum Norður Atlantshavi, í 25 ár hevur hann verið millum fremstu íslendsku tónleikarar. Í vár spældi hann eina ógloymandi konsert á Skála, saman við Stanley Samuelsen og Eivør Pállsdóttir. Blústroubardorurin, er ein fantastiskur listamaður, bæði sum tónleikari, sangari, yrkjari og lagskrivari. Hann endar hetta umfarið av "Populærmusik fra Nord Atlanten" tá hann fer á pallin sunnukvøldið.

## Guðrun og Teitur

Hetta er næsta umfar av trimum í røðini "Populærmusik fra Nordatlanten", tað fyrsta var fyri einum mánaða síðan, tá m.a. Teitur spældi eina sera persónliga og egna konsert. Næsta umfarð verður um ein mánaða, og tá er føroyska innslagið Guðrun Sólja Jacobsen, meðan Magnús Eiríksson og Rasmus Lyberth umboða Ísland og Grønland.

Allar konsertirnar byrja klokkan 20.00, hurðarnar lata upp klokkan 19.00, og høvi verður at keypa kaffi og annað leskiligt. Tilber at keypa vikuskiftisatgongumerki, har tú rindar fyri tvær konsertir og fær tí triðju ókeypis.

## VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið






**Veðrið í dag :**
Lot til andøvsgul av útsynningi og um morgunin regn eitt skifti, annars yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av suðri og útsynningi og regn ella mjørki av og á. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og stundum regn ella mjørki. Um kvøldið minni vindur av útsynningi og ælingur. Hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur. Hitin millum 6 og 9 stig. Sunnudagin veksur hann vindin upp í ein strúk av útnyrðingi og ælingur, partvís vátaslettingur. Hitin millum 3 og 6 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 0 |
| Nuuk | 1 |
| Qaqortoq | 3 |
| Ammassalik | 3 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 12 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 10 |
| Aberdeen | 12 |
| London | 14 |
| Tromsø | 8 |
| Bergen | 9 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 15 |
| Keypmannah. | 14 |
| Helsinki | 14 |
| Moskva | 18 |
| Berlin | 12 |
| Warzawa | 17 |
| Kiev | 19 |
| Bukarest | 20 |
| Paris | 12 |
| Madrid | 19 |
| Róm | 17 |
| Malorca | 16 |
| Athen | -- |
| Malta | 24 |
| Tunis | 28 |
| Beijing | 23 |
| New Dehli | 30 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 31 |
| New York | 25 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | 29 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 22 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 985 hPa. í útsynning úr Íslandi fer í landnyrðing og kuldabrúgvin haðani verður yvir Føroyum mikunáttina.




**Í dag:**
Kuldabrúgvin við Føroyar fer eystureftir. Lágtrýstið eystan fyri Hvarvið stendur mestsum í stað.Lágtrýstið norðan fyri Azorurnar stendur í stað og hitabrúgvin haðani verður væntandi við Føroyar hósdagin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 2/10 kl. 06[00]– 3/10. 06[00]. Hitin í gjár: 9,9°
Minsti hiti máldur í okt.: - 4,0° - Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 15,0 mm – mált frá 2/10 kl. 06[00]– 3/10 kl. 06[00]
Avfallið higartil í oktober: 19,0 mm

I EINUM SAMFELAG
HAR TEY VEIKASTU
HAVA TAÐ GOTT,
HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

## VESTFALLSKYRRINDI

28. september Mánin longst frá jørðini
3. oktober Tendring
10. oktober Fyrra kvarter
14. oktober Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 5. Okt. | 08.29 | 20.49 | 07.29 | 19.49 | 07.44 | 20.04 | 10.29 | 22.49 | 11.29 | 23.49 | 06.44 | 19.04 | 05.44 | 18.04 | 08.44 | 21.04 | 09.44 | 22.04 | 08.14 | 20.34 | 09.29 | 21.49 |
| 6. Okt. | 09.10 | 21.31 | 08.10 | 20.31 | 08.25 | 20.46 | 11.10 | 23.31 | - | 12.10 | 07.25 | 19.46 | 06.25 | 18.46 | 09.25 | 21.46 | 10.25 | 22.46 | 08.55 | 21.16 | 10.10 | 22.31 |
| 7. Okt. | 09.55 | 22.19 | 08.55 | 21.19 | 09.10 | 21.34 | 11.55 | - | 00.31 | 12.55 | 08.10 | 20.34 | 07.10 | 19.34 | 10.10 | 22.34 | 11.10 | 23.34 | 09.40 | 22.04 | 10.55 | 23.19 |
| 8. Okt. | 10.46 | 23.14 | 09.46 | 22.14 | 10.01 | 22.29 | 00.19 | 12.46 | 01.19 | 13.46 | 09.01 | 21.29 | 08.01 | 20.29 | 11.01 | 23.29 | - | 12.01 | 10.31 | 22.59 | 11.46 | - |
| 9. Okt. | 11.41 | - | 10.41 | 23.09 | 10.56 | 23.24 | 01.14 | 13.41 | 02.14 | 14.41 | 09.56 | 22.24 | 08.56 | 21.24 | 11.56 | - | 00.29 | 12.56 | 11.26 | 23.54 | 00.14 | 12.41 |

Sosialurin

5 707265 100036 >